# Ingigerð fingið gyltan tarv

**Leiðarin á Kunningarstovuni í Tórshavn hevur júst verið í Spania eftir virðisløn, sum Kunningarstovan hevur fingið fyri gongutúrarnar, skipað hevur verið fyri. Virðislønin er ein gyltur tarvur**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*




*Ingigerð á Trøðni, leiðari á Kunningarstovuni í Tórshavn, hevur verið í Spania og tikið í móti virðisløn, sum latin er fyri gongutúrar við ferðaleiðara, ið Kunningarstovan skipar fyri*

Leiðarin á Kunnignarstovuni í Havn hevur verið í Spania og tikið í móti viðrisløn, Kunningarstovan hevur fingið tilluttaðað fyri at skipa fyri gongurtúrum við ferðaleiðara bæði í Havn og kring landið annars.

Ingigerð á Trøðni, leiðari á Kunningarstovuni, er í hesum døgum í Dnamark á veg heim aftur úr Spania.

Hon greiðir frá, at hon fekk fráboðan um, at Kunningarstovan hevði fingið hendan heiðurin tillutaðan, og at takast skuldi í móti virðirslønini í Spania, um Kunningarstovan skuldi hava hana.

Tað vóru latnar virðislønir til umleið 130 fólk, ið møtt vóru á samkomu í Sania, sigur Ingigerð á Trøðni. 150 fólk og stovnar vóru innstillað, men tey, sum ikki møttu, fáa so onga heiðursløn.

– Eg eri ógvuliga fegin um hesa viðurkenningina, og eg kenni meg at vera komna í sera gott selskap, sigur Ingigerð á Trøðni.

Har vóru fólk úr mestsum øllum heiminum, sigur hon. Nógv vóru úr Karibia, og sera nógv vóru bæði úr Afrika og úr Eystureuropa.

Ein teirra, sum fekk hesa virðislønina, var ein suðurafrikanari, sum hevði ein heldur øðrvísi matstovu. Talan var um eina matstovu, um lá inni í eini gjógv, sum siglast mátti til, og har inni lá so matstovan sum á einum kópalátri, greiðir Ingigerð á Trøðni frá.

Í hesum sambandi kemur hon inn á, at tað kanska kundi verið stuttligt at roynt okkurt sovorðið her hjá okkum. Vit hava umstøðurnar at gera tílíkt, vísir hon á.

Ein teirra, sum fekk virðislønina, var ein gamal fransmaður, sum í áravís hevur skipað fyri einum pianofestivali, ið er vorðin eitt tiltak, ið heimskendir pianistar kappast um at sleppa við á.

Kunningarstovan í Tórshavn hevur fingið virðislønina fyri teir gongutúrarnar við ferðaleiðara, sum skipað hevur verið fyri í áravís. Bæði gongutúrarnar út í Tinganes eins og teir túrarnar, skipað hevur verið fyri kring landið, sigur Ingigerð á Trøðni frá.

Hóast virðislønin er latin Kunningarstovuni eftir innstilling, ber ikki til at fáa at vita, hvør tað er, sum innstillað hevur, sigur Ingigerð á Trøðni. Men hon tekur aftur í aftur, at hon er sera errin og fegin um hesa viðurkenningina.å

# Gistingarhúsini fáa stjørnur

**Føroysku gistingarhúsini verða í næstum støðismett eftir donsku HORESTA skipanini. Tað merkir, at tey fara at fáa stjørnur, eftir hvussu støðið er**

HOTELVINNA
*Edvard Joensen*

Føroysku gistingarhúsini verða nú støðismett eftir danskari skipan, sum gevur stjørnur eftir, hvussu fysiska støðið er. Fyrr hava tey verið mett eftir skotskari skipan, ið gongur eftir tænastuni.

Jeffrei Johannesen, leiðari á Hotel Tórshavn, Tórshavnar Sjómansheimi, er formaður í Gistingarhús og matstovufelagnum. Hann sigur, at í heyst var ein maður frá donsku HORESTA skipanini í Føroyum og metti um støðið á føroysku gistingarhúsunum. Hann gav ikki stjørnur á hesi ferðini, men kom við vegleiðingum og greiddi frá teimum krøvum, sum sett verða teimum gistingarhúsum, ið eru við í skipanini.

Tað eru nevniliga ikki øll tey føroysku gistingarhúsini, ið hava havt vitjan av hesum eftirlitsmanninum, sigur Jeffrei Johannesen. Summi teirra heildu best vera at bíða eina tíð og síggja, hvussu onnur vórðu støðismett, áðrenn tey meldaðu til, sigur hann.

Øll gistingarhúsini, hesin eftirlitsmaðurin vitjaði, kenna krøvini, sett verða teimum, sigur Jeffrei Johannesen, og nú verður so bíðað eftir, at eftirlitið kemur aftur einaferð í vár og rættiliga fer at døma hotellini og geva teimum stjørnur hareftir.

Tað eru í fyrsta umfari bara hotell, sum eru við í støðismetingini hjá HORESTA. Matsovurnar eru ikki við enn, sigur formaðurin í felagnum hjá gistingarhúsum og matstovum.

Jeffrei Johannesen sigur, at støðið á føroysku gistingarhúsunum er bara heilt hampiligt. Vit kunnu væl vera við í altjóða metingum, sigur hann.

Hann heldur ikki, at nøkur grund er til at fara at tillaga føroysku gistingarhúsini til nakra serføroyska skipan. Vit vilja verða altjóða mett, og tí skulu vit eisini hava gistingarhús á sama støði, sum onnur lond hava.

Hann metir donsku skipanina at vera góða. Eitt nú hava bæði sviar og íslendingar eisini støðismett síni hotell eftir hesi skipanini, vísir hann á.

Fleiri av føroysku hotellunum hava longu stjørnur, sum fingnar eru eftir eini skotskari skipan. Tey vórðu støðismett fyri nøkrum árum síðan, og tey klára eisini øll hesi krøvini enn.

Men hendan skipanin gekk meira upp á tænastuna. Tann danska gongur hinvegin upp á tað fysiska, so sum hvussu nógv øskubikar skulu vera, ella hvussu baðirúmið skal síggja út o.s.fr. sigur Jeffrei Johannesen.



Samgongan váttar:

# Góðar inntøkur fáa mest í skattalætta

**– Endamálið við ætlaða skattalættanum hjá samgonguni, er at stimbra vinnulívið, sigur Bárður Nielsen**

SKATTALÆTTIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



– Tað er rætt, at tað verða tær góðu inntøkurnar, sum fáa tann størsta skattalættan í krónum og oyrum.

Tað váttar Bárður Nielsen, úr sambandsflokkinum.

Eftir ætlan skuldi hann veljast til landsstýrismann í fíggjarmálum seinnapartin í gjár og sostatt verður tað hann, ið kemur at standa á odda fyri skattapolitikkinum hjá samgonguni.

Síðani samgongan varð skipað, hevur nógv verið tosað um ætlaða skattalættan, sum samgongan ætlaði at lata.

Útrokningar, sum Útvarpið og Sjónvarpið fingu Toll- og skattstovuni at gera mánadagin, vísa, at hetta ein skattalætti, sum mest kemur teimum góðu inntøkunum til góðar.

Hinvegin fáa vanligar verkamannalønir lítlan og ongan skattalætta.

Tí hava vit spurt høvuðsmannin aftanfyri skattalættan, Bárð Nielsen úr sambandslfokkinum, um hann er samdur við útrokningunum.

Og hann váttar, at í krónum og oyrum verða tað tær hægru inntøkurnar, sum fáa teir størstu skattalættarnar. Hann sigur eisini, at skattalætti, sum samgongan hevur sett sær fyri at fremja, verður í høvuðsheitinum veittur eftir teirri ætlan, sum sambandsflokkurin hevur arbeitt við nú í langa tíð nú.

Men samgongan hevur samstundis gjørt greitt, at skattalættin skal í mesta lagi kosta 60 milliónir um ári í hesum valskeiðnum, ella 240 milliónir tilsamans.

Men í útrokningunum hjá Toll- og skatt, fer ætlaða skattalættin bara í ár at kosta yvir 100 milliónir, bara í ár.

*Tá ið hendan greinin varð skrivað, varð alt, sum bendi á, at tað verður Bárður Nielsen, sum skal standa á odda fyri fíggjarpolitikkinum hjá hesi samgonguni. Ætlaði skattapolitikkurin fer at geva øllum ein trivaligan skattalætta, men tað vil so vera, at tey, sum hava høgar inntøkur, fáa mest í skattalætta, sigur hann*

– Tað kemur hann ikki at kosta, sigur Bárður Nielsen. Hann sigur, at samgongan hevur gjørt av, at skattalættin skal ikki kosta meiri enn 60 milliónir um árið. Vísa útrokningar, at ætlaði lættin fer at kosta meiri, verður skattalættin lækkaður, so at hann ikki kostar meiri enn 60 milliónir.

– Tað er ein treyt í samgonguni. Endamálið er at lækka skattin við teimum prosentum, sum eru nevnd í undirskjalinum til samgonguskjalið, men fer kostnaðurin upp um 60 milliónir, verður skattalættin endurskoðaður.

### Stimbra vinnuna

Bárður Nielsen sigur, at endamálið við skattapolitikkinum er at gera eina meiri proportionala skipan.

– Tað gera vit, fyri at løntakarar ikki skulu gjalda so nógvan skatt av teimum síðst vunnu krónunum,

Hann sigur, at tað, sum er hent seinastu árini, er, at løntakarar hava goldið 55-ella 56% í skatti av teimum lønarhækkingum, teir hava fingið.

– Tað merkir, at hvørja ferð, ein arbeiðari hevur fingið fimm krónur í lønarhækking, eru tríggjar krónur farnar í skatti.

– Hann sigur, at hetta førir við sær, at lønartrýstið alsamt herðist.

Hann vísir eisini á, at hóast lønirnar eru nógv hækkaðar síðani 1997, er keypiorkan hjá einum arbeiðara lækkað.

– Sostatt tekur skattapolitikkurin, sum hevur verið rikin hesi seinastu árini, bæði kappingarførið undan vinnuni og arbeiðshugin frá fólki.

Bárður Nielsen sigur, at endamálið við vinnupolitikkinum er at stimbra vinnulívið.

– Tað gera vit við at forða fyri einum stórum lønarvøkstri og tað gera vit best við at lækka skattin á teimum seinast forvunnu krónum.

Hann sigur, at hetta er nú vent á høvdið, so at summi hava ført fram, at vit lækka skattin fyri at stimbra vinnulívið.

– Tað er akkurát øvugt. Vit ætla at stimbra vinnulívið fyri at skapa vøkstur. Tá ið vøksturin er skaptur, koma vit at mangla arbeiðsmegi. Men fyri at fáa fleiri arbeiðstímar burturúr arbeiðsstyrkini, sum er, mugu vit lækka skattiin á seinast forvunnu krónunum fyri at stimbra arbeiðshugin.

– Sostatt ætla vit at stimbra vinnulívið við øðrum tiltøkum, men fyri at tryggja vinnulívinum arbeiðsmegi, lækka vit skattin.

### Natúrlig gongd

Annars skilst á Bárði Nielsen, at hann heldur, at tað er natúrligt, at tey, sum forvinna nógv, eisini fáa størstan skattalættan í krónum.

– Ein, sum forvinnur heilt lítið, betalir kanska bara 25-30% í skatti. Eg haldi ikki, at tað er rímiligt, at ein ein slík løn eigur at fáa skattalætta.

Annars vísa talvurnar svart upp á hvítt, hvussu skattalættin hjá samgonguni fer at ávirka ymsar lønarbólkar.

Bárður Nielsen sigur, at hesi seinastu árini hevur lønarvøksturin verið so stórur, at skattalættarnir hava onki munað, soleiðis sum undanfarna samgonga skipað teir. Í veruleikanum er veruleikin tann, at samlaða skattatrýstið er økt 3%.

– Tí virkar skattaskipanin ikki, sum ætlanin var og tí er eisini neyðugt við eini kollveltandi broyting.

Men hann vísir eisini á, at ætlaði skattalættin førir við sær, at øll fáa ein lætta. Í fleiri av talvunum hevur hann brúkt eini heilt vanlig hjún sum dømi og tær útrokningarnar vísa, at tey flestu fáa ein stóran skattalætta.

**Yvirlit yvir skatt av arbeiðaralønum 1997-2004 (2008)**

| Kommunuskt 20 % | | | | | Nettoskattur |
|---|---|---|---|---|---|
| Árstal | Tímaløn | Ársinnt. | Skattur | Nettoinnt. | í % av innt. |
| 1997 | 75,86 | 136.548 | 42.999 | 93.549 | 31,49% |
| 1998 | 76,62 | 137.916 | 43.618 | 94.298 | 31,63% |
| 1999 | 80,17 | 144.306 | 46.966 | 97.340 | 32,55% |
| 2000 | 83,72 | 150.696 | 50.510 | 100.186 | 33,52% |
| 2001 | 87,96 | 158.328 | 52.594 | 105.734 | 33,22% |
| 2002 | 92,20 | 165.960 | 55.921 | 110.039 | 33,70% |
| 2003 | 96,50 | 173.700 | 58.779 | 114.921 | 33,84% |
| 2004 | 100,80 | 181.440 | 60.966 | 120.474 | 33,60% |
| 2005 | 105,10 | 189.180 | 65.301 | 123.879 | 34,52% |
| 2006 | 109,40 | 196.920 | 69.635 | 127.285 | 35,36% |
| 2007 | 113,70 | 204.660 | 73.970 | 130.690 | 36,14% |
| 2008 | 118,00 | 212.400 | 78.304 | 134.096 | 36,87% |

*Um ongar broytingar verða gjørdar í landsskattastiganum, og lønarvøksturin verður tann sami í krónum, sum í 2004, verður skattatrýstið á eini arbeiðaraløn 37% í mun til núverandi 33,6% og var hetta í 1997 einans 31,5%.*

**Lønar- og skattabroytingar 1997-2004 (2008)**

| Árstal | Lønarh. í % | Lønarh. | Skattah. nettoinnt. | av hækk. | Hækking í Marg.sk. |
|---|---|---|---|---|---|
| 1997-98 | 1,0% | 1.368 | 619 | 749 | 45,25% |
| 1998-99 | 4,6% | 6.390 | 3.348 | 3.042 | 52,39% |
| 1999-00 | 4,4% | 6.390 | 3.544 | 2.846 | 55,46% |
| 2000-01 | 5,1% | 7.632 | 2.084 | 5.548 | 27,31% |
| 2001-02 | 4,8% | 7.632 | 3.327 | 4.305 | 43,59% |
| 2002-03 | 4,7% | 7.740 | 2.858 | 4.882 | 36,93% |
| 2003-04 | 4,5% | 7.740 | 2.187 | 5.553 | 28,26% |
| 2004-05 | 4,3% | 7.740 | 4.335 | 3.405 | 56,01% |
| 2005-06 | 4,1% | 7.740 | 4.334 | 3.406 | 55,99% |
| 2006-07 | 3,9% | 7.740 | 4.335 | 3.405 | 56,01% |
| 2007-08 | 3,8% | 7.740 | 4.334 | 3.406 | 55,99% |

*Henda talvan vísir, at um landsskattastigin verður óbroyttur komandi árini, verða 56% goldin í skatti av lønarhækkingum hjá einum arbeiðara.*

**Hjún**

| Hjún | Inntøka Kona | Maður | Íalt | Minni skatt |
|---|---|---|---|---|
| | 150000 | 250000 | 400000 | |
| Verandi skattaskipan | 45960 | 99360 | 145320 | |
| Nýggj skattaskipan | 43200 | 84200 | 127400 | 17920 |

| | Inntøka | Minni skatt |
|---|---|---|
| | 150000 | |
| Verandi skattaskipan | 45960 | |
| Nýggj skattaskipan | 43200 | 2760 |

| Hjún | Inntøka Kona | Maður | Íalt | Minni skatt |
|---|---|---|---|---|
| | 100000 | 300000 | 400000 | |
| Verandi skattaskipan | 25260 | 127360 | 152620 | |
| Nýggj skattaskipan | 23100 | 104700 | 127800 | 24820 |

| | Inntøka | Minni skatt |
|---|---|---|
| | 250000 | |
| Verandi skattaskipan | 99360 | |
| Nýggj skattaskipan | 84200 | 15160 |

| Hjún | Inntøka Kona | Maður | Íalt | Minni skatt |
|---|---|---|---|---|
| | 100000 | 200000 | 300000 | |
| Verandi skattaskipan | 25260 | 71360 | 96620 | |
| Nýggj skattaskipan | 23100 | 63700 | 86800 | 9820 |

| | Inntøka | Minni skatt |
|---|---|---|
| | 350000 | |
| Verandi skattaskipan | 155360 | |
| Nýggj skattaskipan | 128700 | 26660 |

*Hesar talvurnar hevur samgongan sjálv gjørt, fyri at vísa, hvussu ætlaði skattalættin fer at ávirka ymsar inntøkubólkar*